

Mynd: Lundin Petroleum

# Lundin komið fram á nógva olju og gass í Barentshavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

14.10.2014 - 08:55

Oljan.fo

Svenska oljufyritøkan Lundin hevur funnið nógva olju og nógv gass í Barentshavinum, í Alta-ætlanini, ið liggur í ein landnyrðing frá Snjóhvítu-økinum.

Í einum boðum sum tey hava sent út í morgun verður sagt at fyribils kanningar vísa at talan er um millum 88 og 314 milliónir føt av olju, og tað sum svarar til eini 400 milliónir føt oljulíkar av gassi.

Brunnurin er tann fyrsti sum er boraður í leitiloyvinum sum kallast 609, og ætlanir eru um at bora av nýggjum í 2015, fyri at kanna hvussu stór hendan goymslan er.

Alta liggur nærhendis Gohta-fundinum, ið bleiv avdúkað fyri einum ári síðani. Saman við Alta hevur Lundin fingið eina sera góða byrjan í tí sum norðmenn vóna gerst ein pengamaskina, tað vil siga oljuframleiðsla í Barentshavinum.

Stjórin í Lundin, Ashley Heppenstall, sigur sambært offshore.no, at tey eru sera væl nøgd við tað sum tey hava funnið í Barentshavinum higartil. hann sigur at tey fara at bora tríggjar avmarkingarbrunnar í 2015. Harafturat hava tey fleiri ætlanir um at royndarbora fleiri staðni í leitiloyvinum 609, tí Lundin metir at har er meir olja at finna.